## Mist stóran sáttmála

Norska frálandareiðaríið Havila Shipping hevur sagt upp ein flutningssáttmála við Phoenix International Inc., sum skuldi leiga tað spildurnýggja "Havila Phoenix", sum hevur kostað reiðarínum einar 550 milliónir krónur at byggja. Havila Shipping bað Phoenix International Inc. um forskot og bankatrygd fyri leigu tað fyrsta hálvárið, men tað hevur felagið sýtt fyri at gera, og tí hevur Havila Shipping nú sagt sáttmálan upp. Leiðslan í Havila Shipping sigur, at nú verður roynt at finna skipinum annan sáttmála. "Havila Phoenix" varð latið reiðarínum í síðstu viku.




## Hummaramenn í kreppu

Hummarafiskimenninir á donsku oyni Læsø eru komnir í stórar trupulleikar orsakað av altjóða fíggjarkreppuni, skrivar Ritzau. Hummari er dýrur matur og verður tí koyrdur av matseðlinum hjá vanligum fólki, tá færri pengar eru til dagligu nýtsluna, og hesum hava hummaramenninir á Læsø fingið sviðan av. Formaður teirra, Thomas Christiansen, sigur við Ritzau, at prísurin á hummaranum er fallin millum 40 og 50 prosent. Umleið 90 prosent av avreiðingarvirðinum hjá fiskimonnunum á Læsø stavar frá hummarafiskiskapinum.

# Tunnilin avgerandi týdning



*Arnbjørn Bjarnarson, varaborgarstjóri heldur, at hóast fólkatalið heldur minkar enn veksur, so er Skálavík lív ålagað í framtíðini*

**Hóast tað í løtuni ikki sær so bjart út við undirsjóvartunlinum til Sandoyar, stendur vónin um tunnilin í besta blóma. Og hóast útlitini kunnu tykjast drúgv, trúgva fólk upp á, at tunnilin er á veg, og meðan bíðað verður, fyrireika kommunurnar seg at taka ímóti nógvu tilflytarunum. Og tað er eisini galdandi fyri Skálavíkar kommunu og Arnbjørn Bjarnarson, varaborgarstjóra**

BYGDALÍV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Skálavík var ógvuliga hart rakt av ódnini 31. januar í fjør. Ikki bert fór havnarlagið illa, men eisini grótkast og gamli kirkjugarður fingu stóran skaða. Í løtuni eru teir í ferð við at byggja eitt nýtt grótkast í Skálavík.

– Ja, talan er um eitt nýtt grótkast, sum vit samtyktu at byggja eftir stóru ódnina á Kyndilsmessu í fjør, tá gamla grótkastið fór so illa. Sum øll vita, var ógvuliga nógvur uppgangur í Skálavík tá, og eftir tað varð mett, at eitt nýtt grótkast mátti gerast, sigur Arnbjørn Bjarnarson, varaborgarstjóri í Skálavíkar kommunu.

Tá hetta nýggja grótkastið er gjørt, skal eisini hitt gamla umvælast.

– Har verður so ein kista sett fyri endan, og so verður nakað av gróti lagt norðan fyri havnargarðin, sum vit kalla, fyri at tryggja bátahylin so væl sum gjørligt, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Talan er sostatt um eitt heilt nýtt grótkast, sum verður gjørt, samstundis sum hitt gamla verður umvælt.

– Tað varð mett, at tað fór at verða ov dýrt at gera gamla grótkastið av nýggjum. Suðursíðan av bátahylinum er so illa farin eisini, at tað varð mett ov lítið bert við tí innara grótkastinum, og tí varð mett, at varð eitt grótkast gjørt norður úr Magnusartanga upp á einar 90 til 100 metrar, so fekst ein góð havn burtur úr tí, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Men Skálavíkar kommuna sleppur undan at bera allan kostnaðin av hesari útbygging sjálv.

– Tað er rætt. Tað hevði kommunan als ikki havt fíggjarliga orku til. Vit hava lánt tvær milliónir, stuðul frá landinum er upp á 1,4 milliónir krónur, og harafturat er talan um gávur frá góðum fólki, ið liggja um ta hálvu milliónina, sigur varaborgarstjórin.

### Nógv stykkjað út

Sum nevnt var tað ikki bert havnin í Skálavík sjálv, sum fekk skaða av stóru ódnini.

– Gamli kirkjugarðurin fór eisini rættiliga illa, men hann er so gjørdur aftur nú. Tað var Jens Pauli Dam úr Húsavík, sum gjørdi hann aftur, og hann stendur næstan sum nýggjur nú, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Fólkatalið í kommununi kvinkar hvørgan vegin.

– Nei, tað stendur í stað, tíverri. Tað skuldi helst vaksið eitt sindur, men tað gongur nokk heldur hin vegin, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Men eisini í Skálavík eru grundstykki tøk, so tað er ikki orsøkin til, at bygdin ikki veksur.

– Vit hava fleiri grundstykki at bjóða, og tað er ikki so langt síðani, at seinasta húsið varð bygt. Eitt bleiv eisini bygt í fjør, so tí viðvíkjandi er eingin trupulleiki, tað ber væl til at